FAKTA

## Úr viðmerkingunum um leikfólk til lógaruppskotið um fíggjarviðurskifti Fólkakirkjunnar:

"Vandin við, at alt størri partur av arbeiðnum í kirkjuni verður samsýnt ella lønt er tvífaldur: fíggjarligi vansin er eyðsæddur, men hevur tá ið samanum kemur kanska minni at siga fyri kirkjuna, í mun til vandan fyri, at kirkjan í alt størri mun verður arbeiðspláss hjá teimum, ið hava útkomu sína har, og harvið í alt minni mun verður ein samkoma, ið fólk taka sær av, kenna sum sína og eru góð við. Gongdin er ikki ókend aðrastaðni".

# Kirkjan ikki yvirtakast eftir yvirtøkulógini

**Tjóðveldisflokkurin er fyri at yvirtaka kirkjuna. Men hetta skal ikki gerast eftir yvirtøkulógini, tí kirkjan skal vera sermál og ikki felagsmál, metir Annita á Fríðriksmørk, ið eisini heldur, at Løgtingið skal seta bisp**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*




*Bæði samgonga og andstøða taka undir við at yvirtaka Fólkakirkjuna. Men semja er ikki um, júst hvussu tekniski leisturin í hesum skal vera*

Tjóðveldisflokkurin fer at atkvøða fyri yvirtøkuni. Hetta helt Annita á Fríðriksmørk seg duga at siga á Trapputinginum týskvøldið.

Hon himpraðist ikki við at siga, at stundum kundi tað tykjast, sum sluppu andstøðuumboðini í politiska fylgibólkinum ikki eins nógv upp í part, sum tey í samgonguni. Men hon helt eins og Poul Michelsen, at talan var um eitt yvirtøkumál, ið varð mýkt sera nógv seinastu árini, tí sambært politikarunum í panelinum var mótstøðan sera hørð í fyrstuni, tá arbeiðið við at yvirtaka kirkjuna av álvara byrjaði fyri næsrum níggju árum síðani.

Bæði Poul Michelsen og Annita á Fríðriksmørk hildu, at tað helst hevði tað verið ov drúgt at vent hvørjum steini, sum tey tóku til, og tí var neyðugt at hava eina freist á ólavsøku, hóast Annita á Fríðriksmørk segði seg onkuntíð hava varhugan av, at samgongan fór at brúka kirkjuna sum eitt mál, ið hon kundi breggja sær av í komandi valstríði.

### Tryggari á føroyskum hondum

Poul Michelsen vísti á, at talan altíð hevur verið um eina føroyska fólkakirkju, og sambært honum verður hon tryggari grundfest, um hon verður føroysk. Hann staðfesti, at tað verður bara føroyska krikjufólkið, sum skal gera av, hvørja kós kirkjan skal fara. Hann metti tí, at tað hevði verið radikalt skeivt, at gjørt broytingar í kirkjuni í sjálvari yvirtøkuprosessini, og tí gjørdi minni, at danskar lógir vórðu brúktar fyrstu tíðina.

Eitt av fólkunum í salinum minti tó á, at tá Landsskúlafyrisitingin varð yvirtikin og sett á stovn í 1979 sum føroyskt málsøki, vórðu bæði danskar og føroyskar lógir brúktir og at hetta kundi vera ørkymlandi fyri arbeiðsgongdina tey fyrstu árini.

### Yvirtøkulógin skal ikki brúkast

Annita á Fríðriksmørk helt, at tann ætlaða yvirtøkan av kirkjuni ikki kundi samanberast við aðrar yvirtøkur, tí kirkjan er so stórur partur av okkara samleika og at kristnitrúgvin ein stóran part av æruni fyri, at fólk vóru búsett á hesum kørgu klettum, sum tikið varð til.

Hon metti tí, at tað kundi tykjast provokerandi, tá spurt varð, um kirkjunnar læra fór at verða eins trygg, sum er nú undir donsku grundlógini. Tjóðveldistingkvinnan staðfesti tó, at kirkjan átti at verið staðfest í eini serligari lóg, sum ikki bara ein meiriluti í Løgtinginum kundi broyta í eini handavending. Hon helt tí, at Stjórnarskipanin átti at havt hesa funktión.

Av tí sama var Annita á Fríðriksmørk ímóti, at tann sonevnda yvirtøkulógin varð brúkt, har "rammer og traditioner" eru felagsmál. Hon segði seg tí hava heitt á uttanlandsnevndinia at kanna hetta, tí Tjóðveldisflokkurin fer tí at berjast til tað síðsta, at yvirtøkulógin ikki fór at verða brúkt í hesin føri.

- Skal kirkjan yvirtakast, skal tað verða sum sermál, staðfesti Annita á Fríðriksmørk.

### Løgtingið seta bisp

Tjóðveldistingkvinnan segði, at hennara flokkur var fyri, at tað verður Løgtingið, sum skal seta bisp eftir vegleiðing frá kirkjuráðunum. Hon grundgav hetta við, at sum nú er, er løgmaður stjórnarleiðari og formaður hjá einum ávísum flokki, tvs. at Føroyar hava einki egið statsyvirhøvd, sum ikki er beinleiðis politiskt. Hetta svarar til, at danir velja Fogh og italiumenn valdu Berlusconi sum yvirhøvd fyri teirra kirkjum, segði Annita á Fríðriksmørk.

Poul Michelsen var tó ikki samdur í, at Løgtingið skuldi gera slíkt umsitingarligt arbeiði, tí hetta er ikki vanligt burtur sæð frá, tá Løgtingið velur Umboðsmannin.

- Løgtingið skal gera karmarnar, segði fólkafloks-tingmaðurin.

## - Kirkjan yvirtikin í einum snupptaki!

**Stundirnar hava verið so góðar at viðgjørt uppskotini um kirkjulógir, vísti Jákup Reinert Hansen á týskvøldið**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Formaðurin í Prestafelagnum, Jákup Reinert Hansen, viðgongur, at tey onkuntíð høvdu ivast í, hvønn leiklut tey høvdu havt í kirkjuliga fylgibólkinum. Hann ásannaði, at núverandi samgonga hevði arbeitt við yvirtøkuni í trý ár, og tí var óheppið, at nógvir av teimum stóru spurningunum ikki vórðu tiknir upp beinanvegin, tí tað eina embætisfólkið, ið hevur tikið við lógarsmíðið varð ikki sett beinanvegin.

Jákup Reinert Hansen vísti eisini á, at tey høvdu fingið fyrsta útkastið til lógaruppskotí einum teldubrævi tann 22. desember, og tá mundu tey flestu hava annað í huganum, staðfesti hann. Millum nýggjár og páskir hevði tann kirkjuligi fylgibólkurin verið á fundi heilar sjey ferðir og hetta hevði verið "øgiliga krevjandi og hektiskt", sum hann málbar seg.

Jákup Reinert Hansen samanbar hetta við at byggja eini hús, har grundin var bygd, men vindeygu og hurðar vórðu gloymd.

Her sipaði Jákup Reinert Hansen m.a. til lógaruppskotið um fíggjarviðurskifti, har t.d. urguleikararnir ikki komu upp í part.

### "Tað fólksliga elementið"

Fakfelagsformaður prestanna í Føroyum nevndi eisini, at tað var sera avmarkað, í hvønn mun eitt nú kirkjuráðslimirnir hvøvdu havt tíð at tosað saman um hesi lógaruppskot. Her nevndi hann hoyringarnar, sum hann kallaði "tað fólksliga elementið". Eitt nú vóru lógaruppskot løgd á heimasíðuna hjá Mentamálaráðnum næstseinasta fríggjadag og hoyringarfundur varð so hildin mánadagin eftir. Tá var ikki sørt, at fólk høvdu hug at flenna eitt sindur í salinum.

Jákup Reinert Hansen endurgav ein dekn, hann hevði tosað við, sum hevði sagt, at kirkjan nú bleiv yvirtikin við einum snupptaki, men at hon nokk annars ikki hevði verið yvirtikin. Hetta sampakkaði eisini væl við orðingarnar hjá politikarunum við borðið, ið søgdu, at skuldi hvør steinur vendast, høvði helst ongantíð verið tíð at yvirtikið kirkjuna.

Sum fakfelagsformaður segði Jákup Reinert Hansen seg tó fegnast um, at í eini grein í einum av lógaruppskotinum stendur, at prestar skulu granska Guds orð, og eftirútbúgving og skeið tí helst eisini fara at standa prestum í boði í framtíðini eins og í dag.